Sjúkrarøktaretiska ráðið Lucas Debesargøta 14 100 Tórshavn

**Ársfrágreiðing fyri 2011.**

Nevdin setti sær fyri at  arbeiða við fylgjandi:

**Arbeiðsætlan fyri árið:**

1. Ætla framhaldandi at arbeiða við at menna etiskt greinandi kompetensurnar hjá limunum.
2. Arbeiða framhaldandi við at gera etiska ráðið sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.
3. Arbeiðið við at dagføra etisku leiðreglur, eins og samstarvið við felagið um viðgerð av lógum og reglugerðum, heldur fram.

**Ad. 1**

Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Hetta hevur verið gjørt fyri at menna kompetensuna hjá limunum at viðgera tvístøður. Støðan er framhaldandi tann, at limirnir senda ikki dømi til Sjúkrarøktaretiska ráðið at viðgera og tað undrar framvegis hví so er. Avleiðingin av hesi undran er, at Sjúkrarøktaretiska ráðið er farið í holtur við eina kanning av hvussu sjúkrarøktarfrøðingar brúka yrkisetisku leiðreglurnar í praksis.[1] Ætlandi verður kanningin liðug og almannakunngjørd í sambandi við, at norðurlendska ráðstevnan um etikk, verður hildin í Føroyum septembur 2012.

Fakfeløgini í Svøríki, Noregi, Danmark og Føroyum hava sjúkrarøktarfaklig etisk ráð. Hesi hava nú í 6 ár fyrireikað og hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, skift ímillum tey ymisku londini. Í ár var ráðstevnan hildin í Danmark – Keypmannahavn við trimum høvuðsspurningum til viðgerðar.

1. Hvønn týdning hava etikkur og normar í einum heilsuverki, sum er í støðugari broyting? v/Tom Kjær, presti á Herlev sjúkrahúsi

[1] Sjá nærri frágreiðing í Vøku nr. 1 2012

2. Frágreiðing um og vitjan á Diakonissestiftelsen[2]
3. Frá Sjúkrarøktaretiska ráðnum til Etiska Ráðið – eitt lop út á 70.000 favnar. v/ Edith Mørk, post doc í kliniskari sjúkrarøkt, Aalborg sjúkrahús

Luttakandi úr Føroyum vóru Maiken Olsen og Hildur við Høgadalsá. Ráðstevnan var skipað við uppleggi, fyrilestri og orðaskifti í arbeiðsbólkum og felags samanumtøku. Nevndin í etiska ráðnum í Føroyum metir, at tað er umráðandi og gevandi at limir taka lut á norðurlendslu etisku ráðstevnunum. Samanumtikið kann sigast, at vit fáa vitan og innlit í arbeiðið og arbeiðshættir at taka við okkum til okkara egna arbeiði, men tað er eisini mennandi at vita, at vit sjálvi hava góð ískoyti til felags menning.

Finnland, Grønland og Ísland hava í løtuni ikki sjúkrarøktaretisk ráð. Fyri nøkrum árum síðani tók nevndin í fakfelagnum í Íslandi allar arbeiðsbólkar og –nevndir av, men nú ljóðar, at ætlanir eru um at endurstovna sjúkrarøktaretiskt ráð. Vit gleða okkum til at bjóða Íslandi vælkomnum aftur á ráðstevnuni í Føroyum sept. 2012.

**Ad. 2**

Tað verður mett sera umráðandi, at sjúkrarøktaretiska ráðið er sjónligt millum limirnar í felagnum. Í árinum sum er farið, hevur dentur verður lagdur á at leggja dømi til etiska umhugsan á heimasíðuna hjá felagnum. Høvuðsyvirskriftirnar í yrkisetisku leiðreglunum eru tiknar sum dømi og spurningar til umhugsan eru settir til tær. Torført er at meta hvørja ávirkan hetta tiltak hevur havt á etiska umhugan, men vónandi hava dømini vakt áhuga og hava birt undir fakligt orðaskifti.

Hóast ynskiligt og aktuelt, hava viðmerkingar ikki verið gjørdar til lógaruppskot vegna væntandi arbeiðsorku í farna ári. Tó hevur nevndin umrøtt relevansin og avleiðingar av at leggja eldraøkið til kommunurnar, men eingin niðurstøða er gjørd.  Ætlanin við FarGen – at gera íleguvitan brúkbara,  hevur eisini verið til umrøðu. Hóast allar positivar ætlanir og møguligar ágóðar fyri fólk, so sakna vit eitt etiskt orðaskifti ímillum fakfólk og politisku

---

[2] //**Diakonissestiftelsen,** *Den Danske Diakonissestiftelse*, sygehus, selvejende institution på Frederiksberg; fungerede tidligere som hospital og modtog fra 1876 patienter fra København og Frederiksberg. Det var i mange år center for behandling af børn med læbe- og ganespalte. Sygehuset lukkede i 1984, og institutionen driver nu plejehjem for ældre, hospice, børneinstitutioner, social- og sundhedsskole, sygeplejeskole og kirkefaglig videreudannelse samt et sundhedscenter med forebyggelse og rehabilitering.//

skipanina. Tað tikist umráðandi, at øll sjónarhorn verða sett á málið fyri at fyribyrgja misnýtslu av føroysku skrásetingini, sum, um hon verður sett í verk, verður sera víðfevnd.

**Ad. 3**

Arbeiðið við at dagføra etisku leiðreglurnar hevur havt eina tilgongd í árinum og møguligar dagføringar eru skrivaðar. [3] Hesar skulu møguliga til viðgerðar á komandi aðalfundi. Tað er ógvuliga umráðandi, at limir felagsins kenna, at teir eiga part í orðingini av leiðreglunum og við tí eisini eiga part í innihaldinum av teimum. Tað er altíð vælkomið hjá limum at gera viðmerkingar/rættingar til leiðreglurnar og sjúkrarøktaretiska ráðið hevur skyldu til at taka atlit til tær.

**Framtíðarætlan.**

Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur arbeitt við hvussu 20 ára haldið hjá ráðnum skal fara fram. Niðurstøðan er at hava eitt tiltak við fyrilestri við Jógvan D. Hansen 9. mai kl. 19.30 væntandi á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum.

**Nevndarlimir til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Valskeiðið hjá limunum sær nú soleiðis út. Súsanna Olsen og Maiken Olsen valdar 2007 og endurvaldar 2011 til 2015. Hildur við Høgadalsá vald 2006 og endurvald 2010 til 2014. Sirið Stenberg vald 2009 til 2013. Katrin Andersen vald 2011 til 2015.
Sirið Stenberg er vald inn á Føroya Løgting og hevur valt at taka seg úr nevndini í Sjúkrarøktaretiska ráðnum. Neyðugt verður tí at hava val í úrtíð á komandi aðalfundi mars 2012. Um vit skulu røkka endamálinum hjá ráðnum er tað ynskiligt, at nýggjur limur eisini umboðar sama arbeiðsøki og ikki er úr meginøkinum í Føroyum.

[3] sjá nærri frágreiðing í Vøku nr. 1 2012.